Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um revsing (Revsilógin)
(Um kynsliga avnoyðslu og lokking)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 215 frá 24. juni 1939 um revsing (Revsilógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 6. desember 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 94, stk. 4 verður "ella á § 232" broytt til: "ella á §§ 229 og 232"

2. § 225 verður orðað soleiðis:

"**§ 225.** Ásetingarnar í §§ 216-224 eru eisini galdandi fyri aðrar kynsligar gerðir enn samlegu. Ásetingarnar eru somuleiðis galdandi, tá ið gerningsmaðurin fær órættaða til at fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan."

3. Í § 228 verður "ella § 227, stk. 1" broytt til: ", § 227, stk. 1 ella § 229".

4. Aftan á § 228, men áðrenn yvirskriftina yvir § 232, verður sett:

"**§ 229.** Fyri lokking verður tann revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár, sum miðvíst ella við snildum og við at misnýta sína yvirvág í aldri og royndum byggir upp eitt samband til ein persón undir 18 ár við ætlan um at fremja kynsligt brotsverk móti viðkomandi."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Samtykt á Løgtingi hin 11. desember 2023 við 28-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 12. desember 2023

stjóri

LM-045/2023